# ÍTRÓTTUR

SAMBAND
JÁKUP MØRK
JAKUP@SOSIALURIN.FO
TLF. 341800

# Toppurin kann skrædna

**Stóri spurningurin um vikuskiftið er, hvørt StÍF megnar at hevna seg inn á Neistan, og á tann hátt økja um spenningin í oddinum**

HONDBÓLTUR
*Jákup Mørk*
*jakup@sosialurin.fo*


*Til tíðir var talan um sera undirhaldandi dyst, tá Neistin fyri tveimum vikum síðani basti StÍF*

Enn er Neistin ósigrað oddalið í Atlantic Airways-kappingini. Og tá teir fyri tveimum vikum síðani vunnu heimadystin móti StÍF, skræddu teir bláu seg veruliga leysar.

Spurningurin hesa ferð er tí, um Neistin kann endurtaka hetta, ella um StÍF hinvegin klárar at økja um spenningin aftur.

Hjá Neistanum verður vónað, at Áki Mørk aftur er tøkur. Hann hevur verið úti í nakrar vikur við einum menisk-skaða. Hinvegin má liðið vera Karl Oddmar Rasmussen fyriuttan, og serstakliga í verjupartinum er hetta ein dyggur smeitur.

### VÍF ígongd

Hinir dystirnir hetta umfarið eru eisini áhugaverdir. Vestmenningar tykjast veruliga hava fingið ferð á seinastu tvey umførini, og tað er hetta, sum teir skulu byggja víðari á, nú teir vitja hjá hoyvíkingum. H71 hevur hinvegin heldur ikki ráð at missa, um teir skulu fylgja við ovaru liðunum ,og tí vilja báðir partar helst leggja nógv fyri.

Spurningurin er so, hvar Kyndil flýtur hesaferð. Higar til hava avrikini hjá liðnum sveiggjað heilt nógv, og fleiri munnu halda, at botnurin varð raktur seinasta vikuskiftið, tá teir grønu vórðu at kalla úrlætnir móti StÍF. Hesa ferð er mótstøðan stigaleysa KÍF, og á pappírinum er tað ein dystur, sum skal geva stig, um Kyndil ætlar sær við í fína selskapið. Hinvegin er tað so púrasta vist, at kollfirðingar vilja stríðast, soleiðis at teir sleppa á talvuna, áðrenn kappingarárið verður heilt miseydnað.

## Dystir um vikuskiftið

### Hondbóltur

**Sunset-kappingin**

| Dagur | Klokkan | Dystur |
|---|---|---|
| 18.11 | 14.30 | StÍF-Neistin |
| 18.11 | 15.00 | Stjørnan-VÍF |
| 18.11 | 15.00 | VB-Kyndil |

**Atlantic Airways-kappingin**

| | | |
|---|---|---|
| 18.11 | 16.00 | StÍF-Neistin |
| 18.11 | 16.00 | KÍF-Kyndil |
| 18.11 | 16.00 | H71-VÍF |

### Flogbóltur

**Meistaradeild kvinnur**

| | | |
|---|---|---|
| 17.11 | 14.00 | KÍF-ÍF |
| 17.11 | 14.00 | Mjølnir-Fleyr |
| 18.11 | 14.00 | SÍ-TB |

**Meistaradeild menn**

| | | |
|---|---|---|
| 18.11 | 19.00 | Mjølnir-Fleyr |

## FM fyri bridge-lið verður leygardagin

**Triðja og fjórða umfar av FM kappingini fyri bridgelið verður nú leygardagin 17. November**

BRIDGE
*Tíðindaskriv*

Bridgeliðini, sum kappast um Føroyameistaraheitið hittast aftur nú leygardagin kl. 10, tá triðja umfar byrjar. Kl. 14. byrjar 4. umfar. Hvørt umfarið er 28 spøl.

Liðið hjá Boga Simonsen og liðið hjá Símun Lassaberg, sum eru tey bæði sterkastu liðini í fyrstu deild, hittast kl. 14.

Sunnudagin kl. 14 er ókeypis opin parakapping í bridgehúsinum.

Síðan verður jólastegður, og næsta kapping er Føroya Bjór Simultan kappingin, sum verður leygardagin 12. januar 2008. Kappast verður í Eysturoynni, í Klaksvík, í Vági og í Tórshavn samstundis við somu kortum og øll úrslitini verða sammett, at finna bestu pørini.